

Rásin í Saltangará


Útbygging















Stovuhædd - felagsøki

// Køkur og hjárúm	86.0	m²
// Matarhøll	78.0	m²
// Undirvísing og goymsla	65.0	m²
// Vesi	7.0	m²
// Kjallari og verkstaður	74.0	m²

Samanlagt(netto): 310.0 m²



1. hædd - kømur

// Kømur og vesi	81.0	m²
// Gongd og goymslur	56.0	m²

Samanlagt(netto): 137.0 m²

(Netto fermetrar er gólvvídd/rúm)
(Brutto fermetrar fyri allan bygningin er 566 m²)

Netto fermetrar samanlagt 807 m²

// Verandi	360 m²
// Nýggir fermetrar:	
/ Felagsøki 1.hædd	310 m²
/ Kømur 2. hædd	137 m²

Lýsing av tørvinum, smb. byggiskrá

30. Januar 2015 bleiv eitt tilmæli handað Mentamálaráðnum og Almannaverkinum. Í hesum tilmæli stendur um broyting av skúlatilboðnum á Rásini. Ynski er at broyta aldursmarki frá 18 ár niður í 16 ár, hetta er tískil gjørt. Síðani er ynski at broyta skúlaskeiðið frá 3 árum niður í 2 ár, hetta er eisini gjørt, eins og **at næmingatali á Rásini fer frá 7 upp til 14, sum krevur at stovnurin verður útbygdur.** Við útbyggingini, verður tað møguligt, at hava upptøku av næmingum á hvørjum ári.

Uppskotið byggir á ynskini hjá Rásini um, at víðka og betra um umstøðurnar. Vit hava tikið støði í hesum ynskjum, og eru tey 5 høvðusevnini hesi:


1. At fáa 7 kømur afturat, so at tað vera 14 í alt.
2. At fáa ein industrikøk, har pláss er fyri at undirvísa 4-5 næmingum í senn í køkinum. Køkurin skal kunna matgera til uml. 20 fólk.
3. At fáa eitt vaskirúm, har pláss er fyri at undirvísa 4-5 næmingum í senn.
4. At betra um starvsfólkaumstøðurnar.
5. Og at betra um undirvísingar møguleikarnar sum heild.

Prosjekt uppskot

Nýggi bygningurin:
Høvuðsatkoman til Rásini (allan bygningin), verður gjøgnum dyrnar í millum bygninginum, har vega-samband er oman til økið norðanfyri bygningin.

Í niðaru hæddini, er innrættað við duri, skúlastovum, skúlakøki og lítlum matsali til búfólkið og til starvsfólkið. Tá størri tiltøk eru, er møguleiki eisini, at rúmið kann leggjast saman við skúlastovuna, har flytbarur skila-veggur er millum rúmini.

Í tí ovaru hæddini, verður innrættað við 4 dupultkømur, harav eitt av teimum er innrættað til rørslutarna. Kømur hava egið vesi við bað. Umframt lyft og trappu millum hæddirnar, eru goymslurúm.



Verandi bygningur:
Í verandi bygningin vera nakrar broytingar gjørdar. M.a. vera funktiónir fluttar i einum rúmi í annað. Annars einans nakrar smærri tillagingar vera gjørdar í verandi bygningi.

Verandi rúm verður broytt til vaskirúmið sum hevur atgongd út á svalan. Á loftinum er einans rokna við at gera smærri umvælingar og ábøtur á flatur.

Kostnaðarætlan

Handverkara útreiðslur (HVÚ)

//	Høvuðsarbeiðstøka	17.170.000 kr.
//	Óvissur	2.000.000 kr.
//	Prís- og lønarvøkstur	1.000.000 kr.
	Brúkt d.d.	0 kr.

Ráðgeving og prosjektering

//	Høvuðsráðgeving	1.547.706 kr.
//	Eyka / lønarvøkstur	600.000 kr
//	Fakeftirlit/Byggileiðsla	540.000 kr.
	Brúkt d.d.	1.282.969 kr.

Leiðsla og umsiting

//	Landsverk	550.000 kr.
//	Byggileiðsla	0 kr.
	Brúkt d.d.	376.001 kr.

Innbúgv, útgerð, køkur

//	Innbúgv og útgerð	1.000.000 kr.
	Brúkt d.d.	0 kr.

Málsettar útreiðslur

//	Arbeiðsplass	400.000 kr.
//	Tryggingar	100.000 kr.
//	Lendiskeyp	100.000 kr.
	Brúkt d.d.	42.340 kr.

Tørvur

//	Meting	25.000.000 kr.
	Brúkt til og við 2021	1.701.310 kr.

Tíðarætlan

